Til Vinnunevnd Løgtingsins
**Viðv. løgtingsmál nr. 34/2018: Uppskot til løgtingslóg um at einskilja P/F Postverk Føroya.**

Vísandi til fundin í Vinnunevndini í dag, verður við hesum sent nevndini:

**Broytingaruppskot til løgtingsmál nr. 34/2018: Uppskot til løgtingslóg um at einskilja P/F Postverk Føroya.**

Sum nýggj § 3 verður sett:

§ 3. Ognarrætturin til allar postsøguligar lutir og ognir, undir hesum søgulig frímerki o.a., hjá P/F Postverki Føroya verður verandi hjá landinum. Ognirnar verða skrásettar saman við Søvnum Landsins.
Stk. 2. Ognarrætturin til øll listaverk hjá P/F Postverki Føroya verður verandi hjá landinum. Ognirnar verða skrásettar saman við Listasavni Føroya.

§ 3 verður eftir hetta § 4.

**Viðmerkingar**
Tá Postverk Føroya varð sett á stovn í 1976, fekk Postverkið frá Post Danmark til gávus fleiri søguligar og siðsøguligar lutir, eitt nú ymisk stempul o.a. Hesir lutir kunnu hava peningaligt virði, men meiri umráðandi er, at lutirnir hava søguligt virði fyri føroyingar og ta føroysku postsøguna. Til tess at tryggja, at postsøguligu lutirnir verða verandi ogn hjá landinum, verður tað ásett beinleiðis í lógini, at hesar ognir Postverk Føroya ikki eru partur av einskiljingini. Saman við Søvnum Landsins er farið undir at skráseta hesar lutir, og hetta arbeiðið heldur fram. Postsavn er einki í Føroyum, og tí er hugsandi, at einskilda postverkið hevur lutirnar í varðveitslu vegna landið.

Postverk Føroya fór beinanvegin í 1976 undir at framleiða og selja frímerki, og hetta gjørdist eisini týðandi inntøka hjá stovninum. Frímerki hava í dag ikki sama týdning, men listaverkini, sum eru brúkt til frímerkjaframleiðsluna, hava framvegis bæði søguligt og peningaligt virði. Dømi er um, at vit áður hava ligið sjóvarfallið av okkum og hava latið av hondum stórt savn av føroyskari list, ið var ogn hjá landinum. Til tess at tryggja, at tað sama ikki hendur í hesum føri, verður ásett, at øll listaverk Postverk Føroya verða verandi ogn hjá landinum. Ognirnar verða skrásettar saman við Listasavni Føroya. Eins og við postsøguligu lutunum er hugsandi, at málningar, tekningar o.a., ið hevur verið partur av frímerkjaframleiðsluni, eins og onnur list, ið Postverk Føroya eigur, verður varðveitt hjá einskilda postverkinum, ið hevur ognirnar um hendi vegna landið.

Vinaliga / Kind Regards

Jóanna Djurhuus
Ráðgevi / Senior Advisor

Uttanríkis- og vinnumálaráðið / Ministry of Foreign Affairs and Trade
Tel +298 556084 • joannad@uvmr.fo • www.uvmr.fo